FØROYA HANDILSSKÚLI

## Starv á Føroya Handilsskúla:

# UNDIRVÍSARI Í FORRITAN Á TELDUSTØÐINGA ÚTBÚGVINGINI



**Um teldustøðingaútbúgvingina:**
Teldustøðingaútbúgvingin er styttri framhaldsútbúgving, ið tekur 2½ ár.

Útbúgvingin fevnir í høvuðsheitum um systemmenning, forritan, tøkni og virki. Kjarnuøkini eru systemmenning og forritan; tøkni og virki eru ætlað at stuðla undir kjarnuøkini. Umframt hetta eru seinast í útbúgvingini sergrein, praktikk og høvuðsuppgáva.

Neyvari kunning um útbúgvingina er á heimasíðu skúlans, www.fh.fo.

**Arbeiðsuppgávur tínar eru m.a. at:**
- undirvísa í forritan
- leggja til rættis undirvísingargongdir, verkætlanir og próvtøkur
- leggja til rættis fakliga innihaldið í útbúgvingini í samstarvi við leiðslu skúlans

**Vit vænta, at tú:**
- hevur viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella aðra hægri útbúgving, ið gevur førleikar at undirvísa teldustøðingum
- hevur áhuga í undirvísing
- dugir væl at samstarva og samskifta
- vilt vera við til at menna útbúgvingina og skúlan
- ikki ræðist nýggjar avbjóðingar

Tað er fyrimunur, men ikki ein treyt, at umsøkjarin hevur royndir við líknandi undirvísing.

**Vit kunnu m.a. bjóða:**
- eitt fakliga mennandi undirvísingarumhvørvi
- eftirútbúgvingarmøguleikar
- góðar arbeiðsumstøður
- ein spennandi og gevandi gerandisdag

**Setanartreytir:**
Starvið er tíðaravmarkað og verður sett eitt ár í senn. Talan er um parttíðarstarv. Starvsstaður er Handilsskúlin í Tórshavn.

Lærarar á teldustøðingaútbúgvingini verða løntir sambært galdandi sáttmála.

Starvið verður sett skjótast til ber.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avritum av viðkomandi skjølum vera at senda Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegi 77, Postsmogu 177, 110 Tórshavn ella við teldupost til alk@hsh.fo. Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 17. august 2009.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Ainu L. Knudsen á tel. 317177 ella á alk@hsh.fo.

Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 200 næmingar á Hægri Handilsskúla (HH) og 200 næmingar á Fyrisiting, handli og skrivstovu (FHS). Undirvísingin fer fram í Havn og á Kambsdali. Í Havn starvast um 35 lærarar, á Kambsdali 20. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri kvøldskúla- og framhaldsútbúgvingum, so sum teldustøðingaútbúgving, HD og akademiútbúgving. Teldustøðingaútbúgvingin er skipað sum fulltíðarlestur í 2½ ár.

FØROYA HANDILSSKÚLI

FØROYA HANDILSSKÚLI

Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tel 31 71 77
Telefax 31 33 74

www.fh.fo

SENDISTOVAN

---

**Klaksvík 6. - 8. august**
**www.summarfestivalur.fo**

# Juli-kappingin

**Vinnari av sudoku-kappingini í juni gjørdist:**
Jonna E. Kruse, Tórshavn

NORÐOYA SPARIKASSI

FØROYATELE

# SUDOKU

Hvønn dag í juli mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan mikudagin 5. august 2009 kl. 10.00 og merkið brævbjálvan »Sudoku«.

Drigið verður í viku 32.

Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4 | | | | 6 | 8 | | 3 | |
| | | | | | | 1 | | |
| | 8 | 9 | 7 | | 4 | 6 | | |
| | 5 | 3 | | 9 | | | | |
| | | | | | | | | |
| | | | | 4 | | 8 | 2 | |
| | | 8 | 2 | | 6 | 3 | 7 | |
| | | 2 | | | | | | |
| | 7 | | 4 | 1 | | | | 9 |

## Vinningurin í juli

4 vikuskiftispass til Summarfestivalin, sum verður í Klaksvík 6.-8. august í ár.
**Virði: kr. 3.800,-**



Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Telefon: ____________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

